# KROSSORÐ

| 485 | TÓDNAR | FLEMING | VANLIGT SPÆL | OXYGEN | GOMUL SLUPP | AMPÈRE | KASTAÐ | TRALEE | SVERARU | SÓT | KVINNA | TRÆ | HJÁLJÓÐ | | STOLTUR | SILICIUM |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| ELEK-TRISK EIND | 1 | | | | | | | | | | | | | EU / EINS | | |
| TÝSKUR JO-HANNES | | | | SPANIA / ISA-FJØRÐUR | | VOLT / REAUMUR | | IKKI SAMSVAR-ANDI / TREYGI | | | | | | | | |
| SKÆR | | | | | | | | | | TEIGAR / STYTTING | 2 | | | | | INN-BÚGVIÐ |
| METUR | | VIÐSKERA / SKYLD-MAÐURIN | | | | KVINNA / ABER-DEEN | | | | | OKKUM | EVJU | HÁLVTÓNI / SONURIN | | | 3 |
| STÓR Á | | | ITALIA | ÍRSKUR BÝUR / FUTTUR | | | | | | | | | | LÍTIL DONSK BYGD | | |
| "KÆR-ASTA" | | | | | | PLAGG / ÚSSA-LIGAR | | | | 4 | | | | EFFER-SØE | KÓS / SKIP | |
| REICHS-MARK | | | SKAFT / "NEI" | | | | TONS / GNADDAR | | | SOVI / AMBOÐ | | | | | | |
| UNITED NATIONS / Á Í SIBIRIA | | | | --? OG VIKU | | | | | HYDRO-GEN / REX | | INDIANARI / KVINNUR | | | | 5 | |
| TRÆ-BLÁSARI | | | | TANN / ÁSTØÐI | | | | KLØN / NATRIUM | | | 6 | GALWAY / NITRO-GEN | | FLJÓT Í ITALIA | | |
| BE-RYLLIUM | | | MJØRKIN / TÝSK-LAND | | | | | | KVINNU | | | | | AIR FRANCE / SVARAR | | |
| HUGSKOT / DREGUR | | | | 8 | KOM-FÝRUR / FLUOR | | | | ANTONOV | | | NERTA VIÐ / BUKA | 7 | | | |
| SÝSLU-MERKI | | | LATA / FISKUR | | | | | KVINNA | STEINURIN / DUGNA-LIGA | | | | | | | |
| VIT (TVØRÁ-MÁL) | | | | | Í STÓRAN MUN | DRÍV | | | | MAÐUR / RØNNE | | | | | FINGU SÆR | MEIN |
| HILDIN UPPAT | | | | | | ¨ CAPO | BEIN / NITRO-GEN | | | | NORGE / SUFF | | PRÍS / GAMALT REIÐARÍ | | | |
| HÓRA | | | | ILL-VEÐRIÐ / ALFA | | 9 | | 10 | | KOYRA | | | | HINA FERÐ / TONS | | |
| REX | | HYGGJA | | | | | NATRIUM | | | SKÝFLÓKI | | | 11 | 12 | | |

## Vinnari:

*Sigmund P. Skorastein*
*Toftanes 12*
*520 Leirvík*

## Loysnin frá seinastu viku
## Loysunarorðið: PERLUBONDINI

| | | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| P | E | N | I | N | G | A | S | T | O | V | N | U | R | I | N |
| FI | S | K | I | G | R | U | N | N | U | R | | S | U | N | I |
| L | O | T | | O | A | S | A | | S | Á | L | | S | K | |
| K | P | | C | | S | | R | E | E | | O | S | T | A | R |
| A | | F | A | R | A | O | | U | | A | N | | A | | Ó |
| 484 | F | Ø | T | | G | G | G | | T | N | | M | | H | L |
| F | Ø | R | O | Y | A | R | | G | R | I | M | A | R | | I |
| EI | R | A | | A | R | A | L | | O | R | A | N | | E | G |
| D | O | R | A | | Ð | | I | N | N | | R | A | N | G | A |
| TE | Y | | B | A | U | D | | Ó | G | E | R | Ð | | O | |
| L | A | B | B | A | R | | P | A | U | | A | U | D | | J |
| | B | O | A | | | O | R | | R | E | | R | | T | U |
| GL | A | S | | U | G | G | A | R | | V | A | | H | E | L |
| | N | | F | R | E | N | S | A | G | E | L | D | A | R | I |
| TO | K | A | | | V | I | A | | I | N | D | I | A | N | A |
| E | I | N | A | H | A | N | D | I | L | | A | N | G | A | N |

### Hvønn fríggjadag

er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn – og viðmerkið »Krossorðagáta nr. …« á bjálvan.

Loysunar-orðið: ............................................ **485**

Navn: ..............................................................

Bústaður: .....................................................

Bygd/býur: .....................................................

***Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!***

Frá ***BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:***

- ☐ **Okkara kokkar** – *Gudmund Gudmundsson*
- ☐ **Grund 1** – *Steinbjørn B. Jacobsen*
- ☐ **Ein farri av kolvetni** – *Marjun Kjelnes*
- ☐ **Veður og tíðindi í Føroyum 1875–2002** – *Petur Skeel Jacobsen og Finnbogi Ísakson*

Frá ***FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:***

- ☐ **Heimsatlas**
- ☐ **Føroysk Flora** – *Jóhannes Jóhansen*
- ☐ **Havið** – *Bogi Hansen*
- ☐ **Heimsins lond**
- ☐ **Grót og steinar** – *Martin Heinesen týddi*

***Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt***

# Hví óttast suðuroyingar broytingar?



**FINNLEIF GUTTESEN**
Tvøroyri
fg800@post.olivant.fo

**Hesin spurningur er viðkomandi, nú menningin av Suðuroy í stóran mun er steðga. Er tað tí, at eingin broyting er tað tryggasta og tað hava suðuroyingar tað best við?**

Eingin veruligur vilji er hjá teimum, ið ráða fyri borgum, um at gera broytingar, har er einki format, eingin visjón um at fáa Suðuroy uppá føtur, tey hava tað best við, at alt er við tað gamla, tí so sita tey trygt í sínum sessum. Tað einasta vit hoyra frá teimum ráðandi er, hvat er gjørt galið, hvør hevur fingið hvat og at geva hvørjum øðrum skylduna, ístaðin fyri at samstarva og hyggja frameftir.

Suðuroyingar eru hjartkiptir fyri at missa identitet/samleika, hetta síggja vit best, tá tosa verður um samanlegging av kommunum og ítróttarfeløgum. Teir síggja bert trupulleikar við samanlegging, tí teir halda, at teir verða gloyptur av einum mótparti.

Ístaðin fyri ein mótpart, skuldu teir sæð ein samstarvsfelaga og ístaðin fyri trupulleikar, skuldu teir sæð tað sum eina avbjóðing í, at fáa mest møguligt burturúr einari samanlegging, til gagns fyri allar suðuroyingar og ikki bert fyri tann einstaka politikaran ella kommunu.

Tá høvdu allir suðuroyingar fingið somu møguleikar og treytir.

**Vágur-Tvøroyri**

Seinastu dagarnar er komi fram, at býráði í Vági ikki heldur seg kunna samstarva við býráði á Tvøroyri og hetta skilja flest allir suðuroyingar, tí tær útmeldingar, ið koma frá býráðnum á Tvøroyri, eru oftast betur ósagdar.

Men við einari samanlegging av øllum kommununum og einum býráði við 11 ella 13 limum, fær Tvøroyri kanska ei triðing av limunum og hinar kommunurnar tveir triðingar, so tað er eingin orsøk til at óttast, at Tvøroyri skal "bestemma" alt, tvørturímóti.

**Eitt Suðuroyarlið**

TB vil ikki leggja saman við hinum feløgunum um eitt lið í Formuladeildini, eitt Suðuroyarlið, tí teir óttast eitt ella annað, at blíva gloyptur ella kanska spælararnir halda, at teir ikki sleppa við á eitt felagslið, men har er bert at siga, at um teir eru nóg góðir, so skuldi eingin trupulleiki verði har. At teir koma at kappast um plássini, er væl bert mennandi fyri spælarar og liði.

Ungdómsdeildirnar í fótbólti samstarva og mær vitandi er tað eingin, ið hevur tala um, at feløgini TB,VB,Sumba og Royn skulu niðurleggjast. So tað kann bert verða manglandi vilji og dirvi hjá spælarum og nevnd, ið forðar fyri samstarvi og samanlegging.

# Illgrunasom valskipan



**DAN R. PETERSEN**

Sambært lógunum hjá F.F. skal mín uppstilling latast inn til umsitingina hjá Óla Jacobsen.

Mítt mótvalevni liggur nú inni við mínari uppstilling og sær, hvørjir stillararnir eru. Eg havi fingið váttað móttøkuna, men havi ikki fingið váttað, um uppstillingin er í lagi, men tað fari eg at krevja, áðrenn freistin er úti.

Hetta svarar til, at var løgtingsval, so skuldu allir teir politisku flokkarnir latið sínar listar inn til tann eina, lat okkum siga Miðflokkin til góðkenningar. Ein løgin mannagongd. Eg meti tað sera óheppið, at mítt mótvalevni skal kenna mínar stillarar, sum ongin annar kennir uttan sóknarformaðurin her í økinum.

Tað er tankavekjandi, at longu nú hevur ein manning (mínir stillarar) fingið ábreiðslu frá sínum reiðara fyri at hava skotið eitt annað valevni upp enn Óla. Hvør hevur likið? Og hví man hesin reiðarin hava áhuga í at hava Óla sitandi?

Eg føli meg eisini sera ótryggan við, at tað er umsitingin hjá mínum mótvalevni, sum ger vallistan, t.v.s. avger, hvør sleppur at velja og sendir atkvøðuseðlarnar út. Alt hetta átti grannskoðarin hjá F.F. at tikið sær av, sjálvandi.

Felagsins lógir eru frá 1980. Formaður tá var Óli Jacobsen, sum sjálvandi var arkitektur fyri hesi ivasomu valskipan, sum avgjørt gevur sitandi formanni stórar fyrimunir.

Hetta eru ikki einastu fyrimunir, sitandi formaður hevur. Onkran annan ódemokratiskan fyrimun hevur hann tiltuskað sær, men tað vendi eg aftur til, tá eg fortelji frá vitjanini, eg hevði hjá honum, og eg als ikki var vælkomin.

Allar felagsins lógir skulu endavendast eftir vaktarskiftið.